# Lovsangur í Miðlahúsinum




Í sambandi við nýggju lovsongsfløguna hjá Lovsangsbólkinum í Filadelfia samkomuni í Havn verður útgávukonsert í Miðlahúsinum í Vágsbotni kvøld.

Fløgan hevur heitið: »Nær hjá Tær« og kom út í síðstu viku. Sangirnir og tónleikurin á fløguni fevna breitt frá bleytum popp til rokk. Tekstirnir ber kristni boðskapin. Hetta eru stutt sagt lovsangir í rútmiskum tónleika hami.

Á tiltakinum verður tilfarið av fløguni at hoyra. Lovsongsbólkurin syngur altíð av heilum hjarta, og karmarnir í Miðlahúsinum eru vanliga nærum fullkomnir til tær inniligu konsertupplivingarnar. Tí er lagt upp til eitt stórfingið kvøld, tá konsertin verður Miðlahúsinum kl. 19 í kvøld.

**nud**

# Popplist er enn ovast á sølulistanum

Savnsfløgan hjá 3'aranum og TUTL Popplist 4 liggur enn einaferð á ovastu rók á sølulistanum hjá 3'aranum, og eisini á øðrum og triðja plássi er listin óbroyttur við Poppkorn og Dynamit. Toppurin er sostatt enn føroyskur, hóast fýra útlendskar fløgur eru slopnar inn á listan hesa vikuna.

Now 12 og Now Big Hits 2005 eru sum vænt á listanum, men eisini Now 62 og Korn við See You On The Other Side eru slopnar upp í part. Annika Hoydal, Ólavur Højgaard og Ólavur Á Váli eiga hinar fløgurnar á topp 10 listanum.

**nud**

# Føroya Banki eisini á 3,45%

**Føroya Banki hevur nú sent út tíðindaskriv um tillagingar í rentubygnaði bankans**

**RENTA**
*tíðindaskriv*

Stjórn bankans hevur í dag avgjørt at lækkað útlánsrenturnar á 1. veðrættar búlánum til 3,45% og innlánsrentunar á øllum innlánum við uppsøgn við 0,25 prosentstigum. Samstundis útbjóðar bankin eitt nýtt innlánsslag við hægri rentu.

Teir uppspararar, ið hava uppsparingstørv yvir longri áramál, kunnu við fyrimuni gera íløgur í virðisbrøv, ið geva hægri rentu. Føroya Banki bjóðar sínum viðskiftafólkum við slíkum uppsparingstørvi holla ráðgeving um virðisbrævaíløgur. Til hetta endamál hevur Føroya Banki hesar síðstu mánarnar útbúgvi fleiri av sínum kundaráðgevum um alt landið til íløgukundaráðgevarar.

Fyri teir uppspararar, ið ikki ynskja at gera virðisbrævaíløgur, bjóðar bankin eisini eitt nýtt innlánsslag við eini hægri innlánsrentu á 2,75% við 3 ára uppsøgn. Innlánsslagið fæst bæði til pensjónsuppsparing og vanliga uppsparing. Tað eru ikki avmarkingar fyri, hvussu stóra upphædd viðskiftafólk bankans kunnu seta inn á nýggju innlánskontuna, tó eru vanligu avmarkingarnar fyri 60 ára kontu galdandi fyri pensjónskontuna.

## Rætting um Nýggjárskonsertina

Av misgáum skrivaðu vit í blaðnum í gjár, at Side Effect var ein av bólkunum á Nýggjárskonsertini, men hetta er ikki so. Bólkarnir, ið luttaka eru: Páll Finnur Páll, Lama sea, SIC, The Message, The Dreams og The Story Ends umframt dansibólkin The Black & White.


STARVSLÝSING

## Arkitektur/Verkfrøðingur/Byggifrøðingur

**Ert tú áhugaður í nýggjum avbjóðingum á eini ungari deild í menning — verkleiðsludeildini hjá Landsverki?**

Verkleiðsludeildin varðar av øllum almennum byggiarbeiðum — vegabygging, tunnilsgerð, havnabygging og húsabygging — frá prosjekteringsbyrjan til avhending og garantisýn. Deildin var stovnað fyri umleið fimm árum síðani, og tann, ið verður settur, fer at luttaka í eini framhaldandi menning av deildini.

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eitt nú um:
- byggiharraráðgeving
- prosjektstýring
- byggileiðslu
- samskifti við aðalráð, ráðgevarar, arbeiðstakarar og aðrar áhugabólkar
- útbjóðing
- sáttmálar við ráðgevarar og arbeiðstakarar
- prosjektgransking

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir arkitekti/verkfrøðingi/byggifrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving við góðum samstarvsevnum og áhuga fyri omanfyri nevndu málsøkjum. Starvið er sera sjálvstøðugt, og gevur tær góðar møguleikar fyri at fremja tínar hugsjónir í verki. Royndir innan eitt ella fleiri av nevndu virkisøkjum gevur fyrimun, men er eingin treyt, tí roknast kann við neyðugari upplæring ta fyrstu tíðina.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeitt verður skiftitíð, og møguleikar eru fyri eftirútbúgving. Starvið verður sett skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn við lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til:

Landsverk
Postmoga 78
110 Tórshavn

og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 2. januar 2006.

Merkið brævbjálvan "starvsfólk til verkleiðsludeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Kristiani Rasmussen á tel. 311 333 (t-postur: kr@lv.fo).

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land



KØKUR Í SERKLASSA FRÁ INVITA - det personlige køkken



30% í avsláttri uppá COMET í desember

Sandavágs Timburhandil · á Hillingatanga 6
Fo 360 Sandavágur · tel 332700 · fax 332701 · invita@post.olivant.fo



PEUGEOT 806




Keyptur í mai 2001
Prísuppskot 140.000,- v/mvg

Málarameistarin Uni Zachariasen

Djúpagilsvegur 44 · FO-188 Hoyvík
Tel.: +298 319299 · +298 219299